Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health

Tórshavn, 24. oktober 2012
J. nr.: FHR-10-332/20120001-4
Viðgjørt: PW/elp

**Frásøgn frá fundi um rúsevnisstøðuna í Føroyum, hildin í Fólkaheilsuráðnum, tann 23. oktober 2012.**

Á fundi vóru umboð fyri løgregluna, tollvaldið, Heilsumálaráðið og Fólkaheilsuráðið. Tey, sum vóru á fundi:

Karen Marie Olesen – fúti - Løgreglan
Peter Thaysen – politiinspektørur - Løgreglan
Bergleif Brimvík - politikommiserur - Løgreglan
Jan Johannesen – løgreglumaður - Løgreglan
Kjartan Dam Joensen – yvirtollari - TAKS
Fróði Davidsen – tollari - TAKS
Katrin Gaard – fulltrúi - Heilsumálaráðið
Pál Weihe – formaður - Fólkaheilsuráðið

Endamálið við fundinum var at gera eina støðumeting av rúsevnisnýtsluni í føroyska samfelagnum beint nú – grundað á metingarnar hjá tollvaldinum, løgregluni, Heilsumálaráðnum og Fólkaheilsuráðnum.

Tollvaldið segði frá einum ávísum vøkstri av tí, ið hald verður lagt á, men um hetta er eitt tekin um, at meira verður innflutt til landið, ella tað er eitt tekin um, at tollvaldið er meira effektivt í sínari leitan, er ilt at siga. Tollvaldið hevur í hvussu so er fingið betri amboð til at leita, og samstarvið við løgregluna hevur verið fyrimyndarligt. Tollvaldið hevur gott samstarv við flutningsfeløgini, sum flyta inn ferðafólk, soleiðis at tað ber til at leggja til rættis í góðari tíð, hvør skal kannast nærri.

Løgreglan hevði ein lista yvir nøgdina av euforiserandi evnum, sum løgregla og tollvald hava lagt hald á seinastu árini. Tølini viðvíkjandi euforiserandi evnum í 2012 vóru hesi:

- 6.302 g av hasji
- 124 g av MTMA
- 74 g av amfetamini
- 1 g av kokaini
- 28 g av skunk
- 213 hasjplantur
- 62 Ritalin-tablettir

Tað er ikki lagt hald á marihuana, speed, heroin, esctacy, opiatir, joint og soppar.

J.C. Svabosgøta ● FO-100 Tórshavn ● Tlf.: +298 30 47 00 ● Fax: +298 30 47 10
Heimasíða: www.folkaheilsa.fo ●T-postur: fhr@folkaheilsa.fo

Bæði løgregla og tollvald søgdu frá, at smuglingarhátturin/framleiðsluhátturin gerst alt meira "professionellur". Tey høvdu funnið rúsevni í eldsløkkjarum og akkumulatorum o.s.fr. Eisini var innvortis flutningur vanliga fyrikomandi. Løgreglan helt, at narkotika umráðið var nú so lukrativt í Føroyum, at eisini professionellir brotsmenn høvdu áhuga í tí. Tað kundi síggjast av teimum kurérum (sendifólkum), sum tiknir vóru, og av hvaðani hesir komu. Løgreglan segði eisini frá vaksandi virksemi at fáa hasjplantur at vaksa heima við hús hjá fólki. Tey høvdu sæð hasjplantu-vakstrarrúm væl goymd aftanfyri bókreolir og líknandi.

Enn var málið um møguleika at avlurta telefonir ikki loyst, og trupulleikin er framvegis tekniskur.

Tað er arbeiði í gongd við at broyta lógina um euforiserandi evni, soleiðis at hon verður lík tí donsku, og sambært Katrina Gaard úr Heilsumálaráðnum verður hendan lógarbroyting væntandi framd í bræði. Ein fyrimunur við hesum er, at tað verður lættari at viðgera tey nýggju evnini, sum støðugt koma á marknaðin og skulu definerast innan lógarkarmarnar.

Fólkaheilsuráðið segði frá, at sambært kanningar í 9. flokki er nýtslan av rúsevnum í Føroyum enn sera lág samanborið við onnur lond í Europa. Vit liggja í botninum. Hinvegin vita vit ikki, hvussu tað stendur til hjá meira tilkomnum fólki. Tað hevur verið eitt ynski um at fáa skrásetingina hjá viðgerðarstovnunum Bláa Krossi og Heilbrigdi gjørda soleiðis, at tað verður møguligt at gera hagtøl, grundað á einstaklingar. Hetta fyri at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu nógv fólk í veruleikanum eru rúsevnamisnýtarar og ikki bara nýta narkotika til okkurt serligt høvi. Hetta tal hevði verið ógvuliga hent, tá talan er um, hvussu útbreidd narkotikamisnýtslan er í samfelagnum, og sum Peter Taysen segði, at útfrá tí hevði verið møguligt at rokna aftureftir fyri at fingið eina hóming av, hvussu nógv narkotika á leið kemur inn í samfelagið.

**Niðurstøða**

Samanumtikið tykist tað sum, at narkotika innflutningurin er vorðin meira professionelt skipaður, mettur útfrá innflutningshættunum og slagi av kurérum. Innflutningstølini eru eitt sindur hækkað í ár í mun til undanfarin ár, hvat hasji viðvíkur, og so er talið av hasjplantum, sum funnar eru í landinum, stórliga vaksið. Løgregla og tollvald mettu, at tann orka, sum verður sett av til narkotikafyribyrging hjá teimum, er á góðari leið, tá sammett verður við onnur umráði, sum eisini eru álvarslig fyri samfelagið.

Pál Weihe,
formaður